Citröen C5 Stc. Car

er nú komin - eisini í diesel

Komið inn á gólvið og hoyri meira um C5

Nú fáa tygum ein nýggjan møguleika at uppliva, hvussu Citroën nýtir ta nýggjastu og mest framkomnu teknnina. Við Citroën C5 Weekend er serligt rúm fyri nýhugsan, og er C5 somuleiðis ein av rúmligastu stationcarbilunum í klassanum. Bæði fyri ferðafólk og viðfari. Roynið sjálvi einaferð at fylla hann. Men minnist til at trýsta á knøttin í viðførisrúminum, tá lækkar C5 niður í ta lægstu lessihæddina í klassanum. Leggið síðani til merkis meðan tygum koyra, at C5 stillar koyripositiónina og vegatakið inn av sær sjálvum – uttan mun til hvussu, tungt lessaður hann er og uttan mun til ferð ella, hvussu lendið er, tygum koyra á. Hetta er takkað verið teirri nýggju Hydraktiv 3 fjaðraskipanini hjá Citroën. Um tað einans eru smálutir, tygum nýtast at koyra í viðførisrúmið, er tað nóg mikið at lata rútin á baksmekkuni upp. Forrestin kanst tú rulla eitt trygdarnet upp, so viðførisrúmið og kabinan verða skild sundur. C5 Weekend er luxusútstýrdur. Øll snið hava m. a. aircondition, el-rútar og spegl, fjarstýrd sentrallás, hita í setrunum framman, fløguspælara, multifunktiónsskerm, hæddarinnstilling av framsetrum, multijusterbart róður – og C5 er fyrireikaður til hándfría fartelefon. C5 hevur seks airbags við airbag-gardinum, ið verja ferðafólk á fram- og baksetrunum. Bremsurnar hava eina serliga teldustýrda ABS-skipan, ið styttir um bremsulongdina við upp til 25% við katastrofubremsing. Við serliga strekari bremsing tendrar katastrofublinkljósið av sær sjálvum. 12 árs trygd er fyri rusti, og tann hydroaktiva fjaðraskipanin krevur einki viðlíkahald tey fyrstu fimm árini ella 200.000 km. Ynskja tygum rúm fyri upplivilsum, fagnaði og nýhugsan, kannu tygum fáa C5 Weekend, við teimum nýggjastu 1.8i 16V og 2.0i 16V motorunum, 2.0 og 2.2 HDi dieselmotorunum við Common rail tøkni og ESP umframt V6 24V motor vi? 210 HK og ESP.

CITROËN
Ivan Johansen Bilar

Ivan Johansen Bilar:

Ein av landsins størstu bilasølum

Tann 4. mai í ár hátíðarhelt fyritøkan, Ivan Johansen Bilar, at 30 ár vóru liðin, síðan bilasølan varð stovnað

BILSØLA
Magnus Gunnarsson

Virksemið hjá fyritøkuni byrjaði á Láarvegnum í 1971, tá sum Renault umboð.

Í 1982 varð flutt í nýggja virksbygningin við Hoyvíksvegin. Í dag umboða Ivan Johansen Bilar, sum er ein av størstu bilasølum í landinum, bilmerkini Citroën, Mitsubishi, Mercedes-Benz og Chrysler.

Bilasølan, Ivan Johansen Bilar, við Hoyvíksvegin umboða í dag bilmerkini Citroën, Mitsubishi, Mercedes-Benz og Chrysler.

Í Vejle hava tríggir danskir bilhandlarar, saman við DaimlerChrysler Distribution í Keypmannahavn, bygt ein bygning fyri 50 milliónir krónur til sølu av brúktum Mercedes bilum. Mercedes Starmark brúktbilasentrið, ið er størsta bilhúsið av sínum slag í Danmark, er bygt eftir heilt nýggjum hugskotum úr USA, Suðurevropa og frá Mercedes-Benz í Stuttgart

Rover 75 Tourer:

Ein elegantur stationvognur

Nýggi Rover 75 Tourer, er ein elegantur stationvognur, ið hevur alt sum sedan útgávan hevur, so sum klassiskt design, sera góðar koyrieginleikar, og er sum ein ektaður enskur bilur innan

BILAR
Magnus Gunnarsson

Rover 75 Tourer er ein stórur bilur, er 4.80 metrar langur, snøggur og hevur flott design. Karossaríið er væl avstívað, undirvognurin og koyrieginleikarnir eru heilt í topp, eins og á sedan modellinum. Eisini er fjaðraskipanin gjørd soleiðis, at bilurin er eins góður at koyra lastaður sum tómur. Fyri at økja um trygdina hjá teimum ferðandi, er ein innbygdur stálringur aftan á bilinum, sum ger, at bilurin betur tolir ein harðan stoyt aftanífrá. Rover 75 hevur eftir stuttari tíð fingið fleiri virðisløgnir.

Classic, Club ella Connoisseur

Takstativið á Rover 75 Tourer er konstruerað til at bera eina viðførisboks ella líknandi, sum kann viga upp til 100 kg. Í fyrstu atløgu fæst bilurin við hesum motorstøddum: 1.8, 2.0 og 2.5 litur bensinmotorum, eins og hann eisini fæst við automatiskum gearum. Rover 75 Tourer ein praktiskur bilur við stórum viðførisrúmi og lastar nógv. Baklúkan er stór og lætt er at fáa viðførið inn, eins og rúturin í baklúkuni kann latast upp. Bilurin verður at fáa í útgávunum Classic, Club ella Connoisseur. Derek Brockie frá DB Bilum, sigur at Rover 75 Tourer eru á veg og prísurin verður umleið 20.000 krónurmeira enn ein samsvarandi sedan kostar.

Kelda: Tíðindaskriv frá Rover Danmark

Rover 75 Tourer er ein sera elegantur stationvognur, sum er rúmligur og hevur eins góðar koyrieginleikar, tá hann er lastaður ella tómur

Land Rover Discovery:

Kosin besti í klassanum

Land Rover Discovery ll er kosin besti bilur í sínum klassa, í nýggju kvalitetskanningini "Total Quality Index", ið just nú er almannakunngjørd

BILAR
Magnus Gunnarsson

Sambært eini kanning av bilamarknaðin, løgdu eigararnir av Land Rover Discovery ll seg ovast á einum lista við 16 SUV-modellum í miðalklassanum. Hetta var ein meting av hvussu væl kundarnir vóru nøgdir við bilarnar, tríggjar mánaðar eftir at teir vórðu keyptir. Kanningin vísti at Discovery ll er ein elegantur bilur, sum fult út livir upp til tað sum kundarnir vænta av einum bili í hesum klassanum.

Best í sínum klassa

Kanningin "Total Quality Index" er grundað á "Startegic Vision 2001 Vehicle Experience Study", ið er ein umfatandi kanning, har meira enn 34.000 brúkarar, ið keyptu nýggjan bil seinasta ársfjórðing í 2000 og fyrsta ársfjórðing í 2001, tóku lut. Tey vóru spurd hvussu teimum dámdu bilin, trygdina í bilinum, koyrieginleikarnar, útsjónina, og ymiskt annað. Alt íroknað bleiv Discovery ll besti bilur í sínum klassa.

Kelda: Tíðindaskriv frá Rover Danmark

ROVER

Royn

ROVER 75

Við mest framkomnu útgerðini - í hábærsligum enskum sniði

Serfrøðingar um ROVER 75: Bilserfrøðingarnir hjá Journal / AA høvde ikki færri enn 150 bilmerkir at velja hin besta burturúr.Teir valdu ROVER til "Car of the Year" og "Business Car of the Year fram um m.a. Toyota Lexus LS 200, Mercedes S og Jaguar S.

Italskir bilserfrøðingar, sum valdu ROVER sum "The World's Most Beautiful Automobile - high class saloon", settu ROVER í bás við Ferrari 360 Modena, Audi TT og Mercedes-Benz CL.

Vælkomin til ein royndartúr

D. B. Bilar

J. Broncksgøta 15 - Tlf. 310.600